## Róðrarhylur í Nesvík



**Nesvík:** Niðan fyri Leguhúsið í Nesvík verður gjørdur ein hylur, sum børnini, ið eru á summarlegu, kunnu hava at rógva í.

Eitt av ítrivunum, sum legubørnini vanliga hava havt, er at fara á flot. Tvey fýramannafør standa í Nesvík, sum brúkt hava verið til at flota við legubørnunum. Men ikki øllum dámar at fara á Sundalagið, tí stutt er suður til Streym, og har rekur rættiliga hart.

Men nú verður ein hylur gjørdur uppi á landi, har rógvast kann í, soleiðis at børnini sleppa á flot, hóast tey ikki fara út á streymasjógv.

Hesin hylurin er ikki serliga stórur kortini, so tvey fýramannafør fara neyvan at verða flotað í honum.

Men í Nesvík rokna tey við, at komandi summar, tá legurnar byrja aftur, verður okkurt fittligt far at flota í hylinum.

Hylurin, sum nú verður gjørdur, verður at kalla bara gjørdur við sjálvbodnari arbeiðsmegi. Okkurt er tó, sum gjaldast má fyri. Sum til dømis tað arbeiðið, sum neyðugt hevur verið at gjørt við maskinu. Men úr Nesvík verður sagt, at har hava fólk trúliga vitjað í summar og arbeitt upp á hylin. Onkur er, sum komin er hvørt einasta vikuskifti í longri tíð til tað sama.

Annars siga tey í Leguhúsinum, at tað hevur verið rættiliga stór undirtøka til summarlegurnar í ár. Allar hava verið fullteknaðar. Ella kanska reiðiliga tað. Tey hava havt umleið 30 børn fleiri á hvørji legu ár ár enn undanfarin ár.

**ej**

## Svimja um Nólsoyarfjørð



*Mynd: Jens K. Vang*

**Nólsoy:** Triðja árið á rað fara froskmenn at svimja um Nólsoyarfjørð í samband við Ovastevnuna, sum hildin verður í Nólsoy. Í ár verður svimjingin nú leygardagin tann 12. august.

Árliga Ovastevnan, har innkomni peningurin fer til svimjihyl í Nólsoy, verður komandi vikuskifti. Í hesum sambandi verða tvey tiltøk, sum snúgva seg um at koma skjótast um Nólsoyarfjørð. Svomið verður av Tórgarðstanga til Nólsoyar, og róð verður við tíggjumannaførum av Argjum til Nólsoyar.

Eins og undanfarin ár verður svimjikapping um Nólsoyarfjørð. Farið verður av Tórgarðstanga Yviri við Strond klokkan 15.00. Tað er ein tíma áðrenn vestfallskyrrindi í Nólsoyarfirði. Luttakararnir skulu møta við húsið hjá radioamatørunum hálvannannan tíma áðrenn farið verður. Tað vil siga klokkan 13.30.

Tey, sum ætla sær at luttaka, skulu hava froskmannabúna og bát at fylgja sær um Fjørðin. Luttakararnir skulu sjálvir syrgja fyri at fáa sær bæði bát og búna. Um eitthvørt er at spyrja um, kunnu fólk venda sær til Erlend Simonsen, sum hevur telefon nr. 31 06 44.

Tað ber til at tippa um, hvussu skjótt vnnarin fer at svimja um Fjørðin. Seðlar liggja á øllum teimum størru posthúsunum kring landið, siga fyrireikararnir. Vinningurin, sum tann, ið er næstur vinnaratíðini fær, er ein snarferð fyri tvey til Hetlands við Norrønu. Íroknað er hotel-uppihald.

Fyrireikararnir siga, at í 1998 var vinnaratíðin 1 tími og 23 minuttir, meðan vinnarin í fjør var nakrar minuttir longri í sjónum.

Kappróðurin, sum verður við tíggjumannaførum av Argjum til Nólsoyar, byrjar klokkan 14.30.

Tilmelding er neyðug til báðar kappingarnar, og skal meldast til sum skjótast.

Svimjararnir skulu melda til hjá Erlendi Simonsen, sum hevur tlf. nr. 31 06 44.

Rógvararnir skulu melda til hjá Reidari Jacobsen á tlf. nr. 32 70 52.

**ej**

# Reystan hann reisir sín stavn

*Tað var sum í grind, tá stóri bátaflotin, sum luttók í regattasiglingini hjá Róðrarsambandinum, legði út úr Havnini á Eiði fríggjakvøldið*

Orð og myndir:
Edvard Joensen





**Eiði-Hósvík:** Fólk vóru í røttum stevnuhýri, tá tey savnaðust Suðuri undir Gerði til at fyrireika seg til ta stóru regattasiglingina suður gjøgnum Sundalagið.

Har vóru fólk og bátar úr at kalla øllum landinum. Ú Vági til Klaksvíkar vóru teir merktir. Og bátarnir vóru sera ymiskir, sum luttóku. Gamlir róðrarbáta, plastikbátar í ymsari stødd og so sanniliga eisini onkur deksbátur var at síggja.

Fyrireikararnir høvdu syrgt fyri rætta »stemninginum« við at seta stórar hátalarar upp, sum spældu tónleik, meðan fólk frá Eiðis Bóltfelag seldi kaffi og køkur við eitt borð tætt við har, meldað varð til.

Áðrenn farið varð, skuldi mynstrast. Samstundis um luttakaragjaldið varð goldið, fekk luttakarin eina troyggju við áskrift, sum prógvar, at hann ella hon hevur verið við í hesum frálíka tiltaki.

Fyrsti teimurin, sum siglast skuldi fríggjakvøldið, var av Eiði til Hósvíkar. Og tað var so passandi, at tað var hálvi eiðismaðurin, bygdarráðsformaðurin í Hósvík, sum sendi bátarnar avstað.

Á veg út úr havnini fingu fleiri av luttakarunum eitt serligt upplivilsi, sum teir helst ikki fáa dagliga. Teir møttu nevniliga eini »forvirraðari« brugdu inni millum grótkastini. Neyðardýrið er helst vorðin heilt óð í høvdinum av øllum gangingum frá árum og skrúvum hvørt um annað.

So legði flotin suður eftir Sundalagnum. Summir róðu, aðrir sigldu. Skjótt sást, at kappróðrar manningarnar, sum vant hava alt summar, vóru væl fyri og struku avstað. Summir vóru so knáir, at teir róðu frá restini av flotanum.



Spennandi fór at verða, hvussu fór at standa til, tá farast skuldi um Streymin. Mundu teir fara at klára at rógva suður um?

Jú, tað gekk upp á stás hjá teimum flestu. Onkur hendingur var, sum fekk eitt sleið, men allir komu suður um so ella so.

Og at áhugin fyri tiltakinum var stórur, sást skilliga á teirri fjøld, sum fylgdi við av landi. Bilar vóru alla staðni at síggja fram við Sundalagnum suðureftir, og brúgvin um Streymin var loðin av fólki, tá flotin fór suðurum.

Sunnan fyri Streym varð lagt stilt eina løtu. Hetta var jú eisini útferð, og tað sást skilliga. Fólk hugnaði sær umborð á ymsu bátunum.

Men ikki var at bíða ov leingi. Hildið varð, at betri fór at vera at hvíla í Hósvík. Og so helt allur flotin leiðina til Hósvíkar, har bátahylurin rættiliga skjótt fyltist.



# Vil hjálpa teimum sum mistu hús og heim í kreppuárunum

*Jenis av Rana, løgtingsmaður fer skjótt at leggja uppskot fyri tingið um teir nógvu føroyingarnir, sum máttu rýma frá stórari sethúsaskuld kreppuni fyrst í nítiárunum*



*Í kreppuni rýmdu túsundtals føroyingar av neyð, men teir sluppu ikki undan skuldini fyri tað. Jenis av Rana heldur, at nú skulu hesi fólkini hava møguleikan at sleppa heimaftur*

Áki Bertholdsen

Teir føroyingarnir, sum mistu hús og heim í kreppuni, eiga at fáa fíggjarliga hjálp.

Tað heldur Jenis av Rana, løgtingsmaður fyri Miðflokkin.

Og hann meinar tað í fullum álvara, tí hann fer skjótt at leggja uppskot fyri tingið um hetta sama.

Jenis av Rana sigur, at tey ringu kreppuárini vóru tað túsundtals føroyingar sum máttu fara av landinum.

–Tey árini var lívsgrundarlagið rykt undan einum hópi av føroyingum. Tey mistu arbeiðið og høvdu ongan møguleika at fáa arbeiðið aftur í Føroyum og tí vóru tey tvingað í útlegd.

Jenis av Rana sigur, at nógv av hesum áttu hús sum tey tískil ikki kláraðu at betala rentur og avdráttir av.

–Men hóast tey máttu rýma frá húsi og heimi, sluppu tey ikki undan skuldini fyri tað.

– Sostatt hava tey enn skuldina av teimum húsunum, sum tey máttu rýma frá, hangandi yvir høvdinum.

Jenis av Rana heldur, at hetta er fullkomiliga órímiligt, tí tað ger tað ómøguligt hjá hesum fólkunum at koma heimaftur.

Hann hevur fingið upplýst, at tað eru ikki færri enn 4.000-5.000 av øllum teimum føroyingunum, sum rýmdu av landinum í kreppuni, sum ikki eru komnir heimaftur enn.

Hann ivast ikki í, at orsøkin til tað er fyri ein stóran part, at teir sleppa ikki heimaftur, tí at teir hava gamla sethúsaskuld hangandi yvir høvdunum.

– Eg haldi, at vit eiga at geva hesum fólkunum møguleika at koma heimaftur. Tí fari eg at leggja uppskot fyri tingið um at veita teimum fíggjarligan stuðul onkusvegna, so at tey sleppa undan teirri gomlu skuldini, sigur løgtingsmaðurin fyri Miðflokkin.

### Ikki annað enn rimiligt

Hann heldur, at tað er ikki annað enn rímiligt at hjálpa hesum fólkunum.

– Alt møguligt varð sanerað í kreppuni. Landskassin varð saneraður, og skip og virki blivu sanerað.

– Og ikki minst bleiv bankin saneraður m.a. fyri at avskrivað hesi somu lánini, sum hesi fólkini máttu rýma undan.

Jenis av Rana heldur tí, at tað er sjálvsagt, at hesi fólkini eisini verða sanerað og sleppa undan hesum somu lánum, sum bankin fekk avskrivað.

– Men í dag eru tað onnur, sum sita í húsum teirra, og í nógvum førum eru tey keypt fyri lítið og lætt. Men tað eru tey, sum bygdu húsini, sum sita eftir við rokningini og Svartaperi.

Ikki minst heldur hann tað vera natúrligt at hesi fólkini verða hjálpt, tá ið bankin og landskassin eru so væl fyri, sum tey eru í løtuni.

### Stór undirtøka

Hann sigur, at hann hevur ikki hugsað so gjølla um, hvussu uppskotið verður orðað.

Men hann væntar, at talan verður um eitt uppskot um at Løgtingið samtykkir at biðja landsstýrið gera eina loysn fyri hesi fólkini.

Hann hevur heilt góðar vónir um, at eitt slíkt uppskot verður samtykt í løgtinginum.

–Eg havði ein fyrispurning í tingininum um hesi viðurskifti í fjør.

– Undir tí orðaskiftinum kom týðiliga til sjóndar, at tað var stór undirtøka fyri at hjálpa hesum fólkum frá tinglimum úr øllum flokkum.

### Sera trupult mál

Jenis av Rana ásannar, at talan er um eitt sera trupult mál at viðgerða.

– Hetta er eitt mál, sum hevur nógvar ymsar liðir.

–Tí er hetta eisini eitt mál, har nógv fólk fara at føla seg órættvíst viðfarnan, sama hvør loysn verður vald.

– Eitt nú hevur tað mangan verið at hoyrt um fólk, sum rýmdu av landinum, frá húsi og heimi og skuld, uttan at at tað var av neyð, men mest tí, at tey vildu royna okkurt nýtt.

– Og hvat við teimum, sum blivu verandi og baksaðu seg ígjøgnum kreppuni.

– Summi, av teimum blivu verandi, blivu sanerað. Onnur blivu verandi, men fingu onki.

– Tað er nógv í hesum málinum, sum er órættvíst.

– Men eg haldi, at vit, sum blivu verandi, skulu fegnast um, at vit megnaðu tað. Men vit mugu heldur ikki gloyma tey, sum fóru, og vit mugu eisini hjálpa teimum.

Jenis av Rana sigur, at enn hevur hann ikki hugsað um málið í smálutum, so hann veit ikki, í hvønn mun allur trupulleikin skuldi verðið tikin upp síni heild.

– Men tað hevði ikki verið órímiligt, heldur hann.

Hann vísir á, at í ólavsøkurøðuni boðaði løgmaður frá eini ørgrynnu av nevndum, sum skuldi kanna og gera niðurstøður um eitt og annað.

– Tað hevði onki verið forgjørt í, um tað eisini varð sett ein nevnd at arbeiða við hesum trupulleikanum.

– Í øllum førum má setast ein leistur upp, hvussu farið verður fram. Tað ber ikki til at veita øllum hjálp yvir heim kamb, tí tað er so stórur munur á trupulleikanum frá einum húski til annað, heldur Jenis av Rana.

# Kunnu nú aftur arbeiða í Føroyum

*Fútaforboðið, sum varð sett í verk ímóti trimum jarðfrøðingum er nú sett úr gildi*

Áki Bertholdsen

Teir tríggir jarðfrøðingarnir, sum herfyri fingu forboð fyri at arbeiða í oljuvinnuni á føroyskum og bretskum øki, kunnu nú ótarnaðir taka arbeiðið uppaftur.

Talan er um um teir tríggjar norsku jarðfrøðingarnir í felagnum Sagex.

Hetta eru tríggir jarðrøðingar, sum fyrr hava arbeitt hjá Saga Petroleum.

Men tá ið Norsk Hydro keypti Saga Petroleum, søgdu teir upp og stovnaðu sítt egna felag, Sagex.

Hesir tríggir jarðfrøðingarnir gjørdu avtalu við føroyska oljufelagið, Føroya Kolvetni um ráðgeving í sambandi við oljuvinnuna undir Føroyum.

Men hetta dámdi Norsk Hydro so illa, at leiðslan har gjørdi av at krevja fútaforboð fyri, at hesir tríggir jarðfrøðingarnir tóku lut í oljuvinnuni í Føroyum og í Bretlandi.

Norsk Hydro segði, at tað átti vitanina, sum hesir tríggir jarðfrøðingarnir høvdu og at teir tí ikki kundi arbeiða fyri ein kappingarneyta, siga teir tríggir í einum tíðindaskrivi.

Annars høvdu teir tríggir jarðfrøðingarnir boðað frá sínum ætlanum. Leiðslan í Saga hevði ongar viðmerkingar, men aftaná tók leiðslan í Norsk Hydo so eina aðra støðu.

Og í fyrstu syftu fekk Norsk Hyro viðhald frá einum undirrættí í Oslo, sum samstundis setti teimum trimum jarðfrøðingunum fútaforboð fyri at arbeiða í oljuvinnuni í Føroyum og í Bretlandi.

Men teir tríggir jarðfrøðingarnir skutu dómin inn fyri hægri rætt.

Og tað loystu seg, tí nú hava teir fingið viðhald. Hægri rættur tók fútaforboðið av aftur. Teir tríggir jarðfrøðingarnir kunnu sostatt ótarnaðir taka arbeiðið uppaftur.

Tann hægri rætturin sigur, at teir tríggir hava ikki brotið tagnarskylduna, teir høvdu mótegis Saga, og teir hava heldur ikki upp á nakran máta misbrúkt ta vitan, teir fingu í arbeiðnum fyri fyrrverandi arbeiðsgevaran.

Teir tríggir jarðfrøðingarnir, Terje Hagevang, Hans E. F. Amundsen og Dag O. Larsen, hava allir drúgvar royndir í oljuvinnuni.

Teir siga, at fúta forbðið hevur tarnað arbeiðnum hjá Føroya Kolvetni munandi, men teir gegnast um, at teir nú kunnu taka arbeiðið uppaftur.



*Føroyska oljuvinnan er í eini avgerðandi løtu. Tað hevur elvt til stórar trupulleikar, at tríggir jarðfrøðingar ikki sluppu at arbeiða fyri Føroya Kolvetni. Men tann trupulleikin er nú loystur.*

Og nú fara teir so afturfyri at leggja endurgjaldskrav ímóti Norsk Hydro.

Teir siga annars, at málið hevur vkt miklan ans og at teir eru takksamir fyri stuðulin, teir hava fingið, eisini aðrastaðni frá enn úr sjálvari oljuvinnuni.

Ikki minst, eru tað feløg og stovnar, sum hava mett hetta sum eitt prinsipp mál um, hvør hevur ognarrættin til vitanarkapitalin og nógv hava stúrt fyri, at hetta málið fór at føra við sær tilvildarlig fútaforboð, sum bæði eru í stríð við siðvenjuna í oljuvinnuni og í vinnulívinum annars.